# Sært tú teg í okkara samtaki?

**Fyri Nema samtakið, ið varar av Atlantstøkni, Senta og Sendistovuni, hevur tað avgerandi týdning, at hava atgongd til fólk við vitanartungum førleikum**

Heitið á útgávuni hjá Gyldendal ”Hvad kan jeg blive?” kundi hóskandi verið víðkað til: “... og hvor kan jeg blive det?”

Herfyri gav Norðuratlantsbólkurin út forkunnuga kanning, ið lýsir nakrar av orsøkunum til at intellektuella tilfeingið endar í einum netto útflutningi. Sæð út frá einum nærum akuttum, vinnuligum sjónarmiði, skal okkurt henda fyri tálma útflutninginum av ungdómum. Sum er, er tørvurin á KT fólki serliga sjónligur, men menniskjan livir sum kunnugt ikki av KT eina. Okkum tørvar allar føroyingar.

Avleiðingarnar av vantandi afturflytingini av útbúnum fólki ger, at føroysku fyritøkurnar merkja inerti í menning og vøksturi og tað fær sjálvandi avleiðingar fyri samlaða búskapin í Føroyum.

Hin vegin er vónleyst at ímynda sær, at føroyski arbeiðsmarknaðurin fer at kunna bjóða somu sømdir og kor, sum eitt nú evropeiska meginlandi. Tað verður eisini ein løta áðrenn veðrið batnar og bústaðarlýsingarnar nevna “Tæt ved skov og strand”.

Men Føroyar hava tó ein hóp av øðrum parametrum, ið eru verd at nevna. Fyri tey, ið vilja gera mun, finst neyvan nakað land, har møguleikarnir eru betri, enn í Føroyum.

Her kanst tú í stóran mun broyta, tillaga og gera av, hvønn leiklut tú sum menniskja vilt hava á umhvørvið. Sagt við øðrum orðum: Nýútbúnir føroyingar kunnu velja, um teir vilja verða ein lítil dunna í einum stórum hyli ella ein stór dunna í einum lítlum hyli!

Christian Nagata sigur at enda:

Vit meta, at vit skulu hava vitanardeplar í Føroyum, um vit skulu megna at draga fólk til okkum og tí mugu vit eisini vísa útisetunum at bæði eitt dynamiskt mennandi og spennandi umhvørvi er í Føroyum. Hetta gera vit m.a. við at leggja okkum eftir teimum komparativu fyrimunum Føroyar hava ella kunnu fáa og við at fáa fatur á vitanartungum starvsfólkum.



*Christian Nagata, stjóri í Nema samtakinum*

# Almannastovan



*Starvsfólk á Almannastovuni*

### UM ALMANNASTOVUNA

Í løtuni starvast tilsamans um 265 fólk á Almannastovuni. Fleiri arbeiða niðursetta tíð, so talan er ikki um fulltíðarnormeringar. Gott 100 starvast í sjálvari umsitingini og yvirskipaðu stápseindunum, meðan 165 starvast á barnastovnum og stuðulsskipanini fyri børn. Almannastovan umsitur fyri umleið 1 mia. kr. um árið.

Almannastovan er eitt spennandi arbeiðspláss við nógvum áhugaverdum arbeiðsuppgávum. Dentur verður lagdur á, at hava eitt høgt tænastustøðið, at rættartrygdin er í lagi og at hava virðing fyri einstaklinginum. Vit miðja í móti at seta fólk í starv við røttu útbúgvingunum og førleikunum til tess at skapa eitt mennandi og gott arbeiðspláss.

### MÁL

Fyri støðugt at menna umsitingina, setur Almannastovan regluliga tíð av til at umrøða málsetningar og viðgera og taka støðu til, hvørji øki skulu mennast og hvørji mál skulu raðfestast fyri eitt nærri avmarkað tíðarskeið. Soleiðis hava vit í vár sett okkum sum mál inniverandi og næstkomandi ár (2008/09) at uppraðfesta menning á hesum økjum:

- Ábyrgdarbýtið – greiðari, færri hendur
- Málsviðgerðin – einsháttan, størri gjøgnumskygni, styttri viðgerðartíð
- Móttøkan – betri samrøðuinnihald, betrað grundarlag fyri málsviðgerð, betri vegleiðing
- Sjónlig Almannastova – betri kunning, aktivari viðspælari, meiri uppsøkjandi.

### VISJÓN

Almannastovan vil…

.. av politiska myndugleikanum, samstarvspartnarum og almenninginum verða kend fyri hava ein etiskt tilvitaðan og ásjónligan góðan fyrisitingarsið, álítandi veitingar, framúrskarandi vitan og tilvitan um okkara virkisøki og ein kunningarfúsan hugburð og praksis.

.. av starvsfólkum verða upplivað sum eitt arbeiðspláss við væl lýstum og greiðum, áhugaverdum og spennandi arbeiðsuppgávum, har dentur verður lagdur á upplæring, førleikamenning, góðar arbeiðsumstøður og samstarvið er bygt á sínámillum virðing, álit, ábyrgd og loyalitet.

..av viðskiftafólki verða upplivað sum ein álitisvekjandi, innbjóðandi, professionell, fakliga kompetent, skjót, rættvís og upplýsandi almenn umsiting.

### MISSJÓN

Missjónin hjá Almannastovuni – okkara tilverugrundarlag – er ásett í almannalóggávuni. Lóggávan áleggur Almannastovuni uppgávuna at umsita eina røð av sosialum fyriskipanum. Vit síggja tað sum

Almannastovunnar missjón:

- at umsita tær ymsu fíggjarligu veitingarnar og stuðulsfyriskipanirnar og veita sosialu ráðgevingina á so munadyggan hátt, at vit í avgerandi mun eru við til at skapa sosiala og fíggjarliga trygd fyri borgaran og byrgja fyri sosialum trupulleikum og loysa íkomnar sosialar trupulleikar.
- at skapa grundarlag fyri støðugari menning og samsvari millum sosiala veruleikan og sosiallóggávuna við at eftirmeta dygdina í sosialu veitingunum, málsviðgerðini og sosiala arbeiðinum og fylgja gongdini á sosiala økinum fyri í tíð at lofta rákum og møguligum sosialum vandamálum.

Fíggjarlig trygd, menning og sjálvbjargni, virkni og viðvirkan, umsorgan og trivnaður, rættartrygd og javnbjóðis rættindi eru mál og virði, sum sosiallóggávan og sosiala arbeiðið byggja á. Okkara tænasta og samskifti við borgaran skal endurspegla hesi virði.